# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Talan var um satt bragd hjá fótbóltskvinnunum, og spennandi verður nú at síggja næstu útgávuna av styrkislistanum hjá FIFA*

# Rimmar sigur hjá kvinnulandsliðnum

**Føroysku fótbóltskvinnurnar vunnu í gjár á Litava. Og tá Kroatia samstundis vann 3-2 móti Bosnia, endaðu Føroyar fremst í kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um rimmar bragd hjá føroysku fótbóltskvinnunum í fýralandakappingini í Kroatia.

Seinastu dystirnir vórðu spældir í gjár, og tá okkara kvinnur greiddu sína skyldu, samstundis sum dysturin millum Kroatia og Bosnia gekk okkum eftir vild, stóðu Føroyar ovast á sigurspallinum, tá kappingin var av. Saman við Bosnia og Kroata fingu Føroyar seks stig, men okkara kvinnur høvdu bestu innanhýsis úrslitini móti hinum báðum, og tí gjørdust okkara fremstar.

Okkara kvinnur fingu tó ikki bestu byrjanina upp á dystin móti Litava. Litava kom nevnliga á odda, men beint fyri steðgin javnaði Rósa Magnussen. Í seinna hálvleiki settu føroysku kvinnurnar seg veruliga á dystin, og við málum frá Heidi Sevdal og Malenu Josephsen tryggjaðu tær sær eisini sigurin í dystinum – og altso eisini í kappingini.

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 6 |
| 2 B36 | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 3 NSÍ | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 2 | 3 | 4 |
| 4 Víkingur | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| 5 EB/S | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 6 B68 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 7 KÍ | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| 8 AB | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 9 ÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 10 07 Vestur | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |

## vodafone deildin

## DYSTIR um vikuskiftið

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17/04 | Víkingur-07 Vestur | Bárður Mortensen |
| 19/04 | EB/S-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 19/04 | B36-KÍ | Eiler Rasmussen |
| 19/04 | AB-ÍF | Georg N. Rasmussen |
| 20/04 | NSÍ-HB | Petur Reinert |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18/04 | Víkingur-MB | Alex Troleis |
| 18/04 | B71-VB/S | Rói Jacobsen |
| 18/04 | Skála-FC Hoyvík | Birgir Sondum |
| 18/04 | TB-B68 | Páll Augustinussen |
| 18/04 | NSÍ-HB | Høgni Hansen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 19/04 | AB-B36 | Pætur Albinus |
| 19/04 | KÍ-Víkingur | Jákup M. Kjeld |
| 19/04 | TB-EB/S | Sólfinn Gudmundsson |
| 19/04 | Undir-B71 | Allan Manai |
| 19/04 | 07 Vestur-ÍF | Símin P. Dam |

# Spennandi finalur

Leygardagin verður stóri felags finaludagurin hjá borðtennis, judo og badminton.

Í borðtennis verður finalan í einmansleiki hjá monnum millum Ragnar Egilsson og Róa Agnarsson, báðir úr Tór.

Hetta er ein endurtøka av finaluni frá í fjør, tá Ragnar vann sítt fyrsta FM-heiti í bestu deildini.

Ragnar hevur eisini vunnið Grand Prix í ár. Grand Prix kappingarnar kunnu eisini kallast landskappingin í borðtennis, tí hesar verða leiktar í 6 umførum gjøgnum veturin.

Rói gjørdist silvur vinnari í Grand Prix, so tað er ikki av tilvild, at júst hesir báðir skulu kappast um gullið aftur nú leygardagin.

Í fjør var kappingin teirra millum sera jøvn og endaði við 4-3 sigri til Ragnar.

## Kvinnur

Eisini hjá kvinnunum verður finalan í ár ein endurtøka frá í fjør.

Aftur hesa ferð eru tað Rakul Mikkjalsdóttir og Marin í Dali, báðar úr Tvøroyrar Borðtennisfelag, sum bresta saman.

Í fjør vann Rakul hesa finaluna 3-2 eftir at hava verið aftanfyri 0-2 í einum sera tøttum dysti, og í ár hevur Marin vunnið Grand Prix kappingina, so lítið er at ivast í, at hetta verður sera spennandi aftur í ár.

Rakul hevur kanska ein eyka trumf, tí síðani september í fjør hevur hon verið á borðtennis eftirskúla í Danmark, har hon hevur vant næstan hvønn dag, men í einari finalu kann alt henda, so óiva fáa vit spenning fyri allar pengarnar í hesari finaluni eisini.

## Aðrar finalur

Fyrrapartin leygardagin verða eisini nakrar aðrar finalur í borðtennis.

Í tvímansleiki hjá kvinnum kappast Rakul Mikkjalsdóttir og Marin í Dali úr TBF móti Annbritt og Eyðbritt Holm úr Royn, og í tvímansleiki hjá monnum verða tað Rói Agnarsson og Ragnar Egilsson úr Tór, sum fara at kappast móti Fróða Jensen úr TBF og veteraninum Peter Niclasen úr Tór.

At enda verður so blandaður tvímansleikur, har Ragnar Agnarsson úr Tór og Marin í Dali úr TBF fara at kappast móti Fróða Jensen og Rakul Mikkjalsdóttir, bæði úr TBF.



*Marin í Dali tapti í fjør finaluna móti Rakul Mikkjalsdóttir. Og einki er at ivast í, at máli í ár er at hevna tapið*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*